Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um undirvísingartilfar til orðblind, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52 a)

1. Hvør er orsøkin til, at ikki nóg nógv og nóg gott tilfar á føroyskum er í m.a. náttúrulærugreinum til fólk við lesitrupulleikum?
2. Hvat verður gjørt fyri at skipa so fyri, at gott og egnað tilfar er tøkt til fólk við lesitrupulleikum?
3. Nær kann væntast, at tilfar til orðblind og fólk við lesitrupulleikum er teldutøkt, so tað er lætt at finna fram og brúka í undirvísing?

Viðmerkingar:
Í døgurðatíðindunum í dag er komið fram, at tilfar á føroyskum í m.a. náttúrulærugreinum sum t.d. støddfrøði og alis- og evnafrøði er ov avmarkað ella ikki tøkt, og at lærarar og næmingar mugu leita eftir fløgum og fløguspælarum fyri at kunna fylgja við. Føroyskt tilfar til orðblind er ikki teldutøkt, og harvið verður ikki fylgt við tøkniligu menningini. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 16. september 2020

Beinta Løwe Jacobsen